
Eyguni vend í ein landsynning

Tættari samstarv við londini í Baltikum, Russland og EU, ynskir ein meiriluti í Norðurlandaráðnum, samstundis tykist áhugin fyri útnorðuri at vera minkandi. Hóast Norðurlandahúsini fáa meir penger komandi ár



Norðurlandaráðsfundurin hesaferð varð hildin í norska Stórtinginum. Nú hevur Ísland tikið yvir formansskapin í ráðnum, og næsta vetur verður norðurlandaráðsfundurin hildin í Íslandi. Eftir tað stendur Danmark fyri tørni...
savnsmynd

JÓGVAN HUGO GARDAR SKRIVAR ÚR OSLO

Betri samstarv millum tey norðurlendsku londini skal gera tað lættari at samskipa tað arbeiðið, sum í dag fer fram millum lond ella í altjóða bólkum av londum, meinar Gun Hellsvik, borgarligur limur í svenska Ríksisdegnum og limur í Norðurlandaráðnum. Hon hugsaði serliga um samstarvið, vit í dag hava við grannarnar fyri eystan. Eitt annað hon legði dent á var, at norðurlensdska samstarvið kann brúkast til at fáa meir burturúr ES-limaskapinum í samband við at tey norðurlendsku ES-londini sita við formannskapinum í ES.

Betri eftirlit

Í gjár samtykti Norðurlandaráðið fleiri mál um mat- og brúkarapolitikk. Fleiri av samtyktunum verða sendar til stjórnirnar í teimum ymsu londunum, men ætlanin er eisini, at Norðanlond skulu standa saman fyri at fáa ávirkan innan ES-samstarvið og í øðrum altjóða felagsskapum.

Orðaskiftið í salinum vísti, at meirilutin í Ráðnum var fyri at fáa eitt rættargrundarlag, sum kann skipa tann fría handilin innan ES. Meirilutin ynskti eisini, at samráðingarnar innan altjóða handilsfelagsskapin WTO skulu tryggja eina reglugerð fyri einum globalum fríhandli.

Ósemja um frískúlaavtalu

Eitt uppskot frá konservativa bólkinum fekk ein meiriluta uppá eina atkvøðu, aftaná at serliga javnaðarflokkarnir og vinstra-sosialistarnir høvdu brúkt nógva tíð til at royna at steðgað ætlanini um at brúka meir pengar til nýggjar frískúlar. Ráðharraráðið skal nú leggja arbeiðið til rættis, fyri at hendan samtyktin kann gerast veruleiki. Tann konservativi bólkurin vil hava, at frískúlarnir fáa somu váttan um stuðul, sum almennir skúlar fáa.

Smáu máløkini

Jógvan við Keldu og Dan Reinert Petersen høvdu lagt uppskot fyri norðurlandaráðið, sum skal tryggja teimum smáu málunum at yvirliva. Uppskotið fekk góða undirtøku í ráðnum og skal nú gerast til ein part av tí málpolitisku skránni. Uppskotið verður nú latið Íslandi í hendi at arbeiða víðari við. Eitt uppskot um at norðurlandahúsini og – stovnarnir í Íslandi, Føroyum, Grønlandi og Álandi skulu fáa meir pengar bleiv samtykt. Somuleiðis skulu pengar brúkast til at tryggja orðabókaútgávur hjá teimum smáu málunum.

Styrkja ES-samskifti

Finski Europaráðharrin Ole Norrback kravdi, at mál sum eru í ES-skipanini og kunnu hava áhuga fyri Norðanlond so skjótt sum til ber skulu finnast fram og sendast inn í Norðurlandaráðið til viðgerðar.

Sterkari politiska leiðslu

Forsetin í Norðurlandaráðnum, norska javnaðarkvinnan Berit Brørby ynskti í síni røðu týsdagin, at politiska leiðslan í Ráðnum verður styrkt, og at tann valdi forsetin skal sita longri enn í dag. Hon ynskir, at Norðurlandaráðið skal gerast drívkraftin aftanfyri okkara samskifti við Russland og restina av Europa.

framhald av »Aftur í 80'ini ella...«

av arbeiðstímum og kostnaðarmiklari útgerð á landi, og kanska kunnu vit eisini í seinasta enda sleppa heilt av við flakavirkini! Svíkur fiskiskapurin ikki, kann eitt ómetaliga stórt vinningsbýti (profittur) skapast fyri teir fáu, sum tað hepnast at gerast reiðari á einum av teimum stóru verksmiðutrolarunum.

Sjálvandi veldst um, hvør eigur eyguni ið síggja; men á pappírinum sær tann nýfordistiska marknaðarloysnin út til at kunna loysa lønsemistrupulleikarnar í føroysku fiskivinnuni. Men hinvegin finst als einki tjak um, hví júst hetta skal vera tann gongda leiðin frameftir. Ætlanin við tí nýggja fløgustuðlinum byggir á hesa nýfordistisku marknaðarloysn, men sjálvt út frá sínum egnu fyritreytum halta grundgevingarnar fyri fløgustuðulsætlanini álvarsliga.

Búskaparliga argumentið fyri at geva fløgustuðul er, at hesin skal stuðla vinnuni til at gerast sjálvberandi, soleiðis at hon framyvir kann byggja á egnar fyritreytir. Men feskastu búskapartølini vísa jú, at privati sektorurin hevur almikið av kapitali. Í løtuni er kapitalurin bundin uttanlands, men hann er kortini nóg stórur at fíggja alla endurnýggjanina av fiskiflotanum!

Tá bæði privatpersónar og fíggjarstovnar sostatt hava nóg mikið av kapitali, skylda avvarðandi politikarar og vinnulívsmenn okkum eitt svar uppá, hvør saklig búskaparlig grundgeving er fyri at fara í landskassan at fíggja nýggjar fløgur í endurnýggjanina av fiskiflotanum!? Er tað veruliga svarið ikki, at ávísir vinnulívslobbyistar gera alt, teir eru mentir til tess at trýsta politiska myndugleikan at geva teimum nakrar fyrimunir, sum teir ikki kunnu fáa á annan hátt???

Tann álvarsami spurningurin í hesum sambandi er, um vit ikki við hesi ætlanini eru við at gera somu mistøk sum í 80'unum. Royndinar úr 80'unum sýna greitt, at føroyska politiska skipanin var ov veik at tryggja tey samfelagsligu felagsáhugamálini. Greið politisk prioritering er ein fyritreyt fyri útnyttan av teim samfelagsligu ressourcunum, m.a. tí at vinnan má vita hvørjum fyritreytum, hon hevur at arbeiða eftir. Hetta mangla vit framvegis í Føroyum (eisini ávíst í nevnda fiskivinnuáliti, p. 4).

Tá vit samstundis hugsa um, at fløgustuðulsskipanin er ætlað at vera tætt tengd at politiska myndugleikanum (landsstýrismanninum í fiskivinnumálum), samstundis sum ongin greiður fiskivinnupolitikkur finst, mugu vit spyrja, um avvarðandi myndugleikar hava gloymt, at landskassin framvegis skyldar danska statinum millum 3 og 4 milliardir, sum stava frá studnings- og veðhaldsævintýrinum í 80'unum? Tað sær ikki mætari út, enn at ætlaði fløgustuðulin minnir meira um tær stuttskygdu loysnirnar, ið gjørdar vóru í 80'unum, heldur enn eitt mennandi samanspæl millum almennan politik og privat initiativ!

Álvarsamar avleiðingar

Vit kunnu skjótt gerast samd um, at grundarlagið fyri eini og hvørjari samfelagsmenning er eitt vælvirkandi vinnulív. Framleiðslufaktorar hava sjálvandi eisini týdning fyri tann búskaparliga vøksturin, og ongin ivi er um, at ein endurnýggjan av fiskiflotanum er neyðug. Men vit loyva okkum at seta eitt álvarsamt spurnartekin við tað skynsama í at fremja hesa endurnýggingarætlan út frá gamlari vanahugsan.

Trupulleikin er, at nógv tað mesta tjakið um føroyska vinnulívsmenning framvegis snýr seg um framleiðslufaktorarnar (kostnaðarstøðið vm.), og sera sjáldan um ávirkan og samanspæl millum vinnulív og samfelag. Harvið verður heldur ikki tjakast um, hvørjar grundhugsjónir ið samanspælið millum almennt og privat eigur at byggja á.

Tann nýfordistiska vinnulívsmenningin førir uttan iva eina framhaldandi centralisering av kapitali og fólki við sær. Í Íslandi hevur ein líknandi politikkur júst skapað eina miðvísa centralisering av øllum vinnulívi og fólki. Enn verri er í Atlantiskum Canada, har tvíhaldanin um fordistiska framleiðslumynstrið hevur havt nógv verri avleiðingar enn tær, vit sóu í sambandi við føroysku kreppuna í byrjanini av 1990'unum.

Vit loyva okkum tí at reisa spurningin, um tær búskaparligu fyritreytirnar í fullveldisætlanini veruliga eru vorðnar til, at um vit skapa nakrar fáar sterkar vinnulívsmenn, so kemur restin av sær sjálvum? Hvussu skulu tey samfelagsligu virðini, ið eitt endurnýggjað, almennt fíggjað og enn meiri koncentrerað vinnulív skapar, koma samfelagnum til góðar? Ella er ætlanin, at teir fáu almennt fíggjaðu stór-reiðararnir skulu fáa allan ágóðan sjálvir?

Framtíðin í føroyskari vinnulívsmenning er ikki eitt treytaleyst val millum eina nýfordistiska vinnulívsloysn og nakað heilt annað. Men við einvísu hugsjónini um framleiðslufaktorarnar sum avgerandi fyri búskaparligum vøkstri, fáa vit ongantíð eitt svar uppá kjarnuspurningarnar um, hví miðvísar fløgur ikki verða gjørdar í føroyska samfelagnum, hóast ovmikið av privatum kapitali er til staðar. Tí mugu vit sjálvandi gera okkum greitt, hvussu vit kunnu fáa meira privatan kapital at gera íløgur í føroyskt vinnulív.

Kjarnutrupulleikin í øllum tjaki um menning av tí føroyska vinnulívinum er, at vit í einvísu hugsjónini um framleiðslufaktorar útiloka heilt avgerandi spurningar um, hvørji árin viðurskifti sum social- og mentunnarlig ávirkan, teknologi og organisering hava á vinnulívið og samfelagsbúskapin í heila tikið. Vit hava stutt sagt brúk fyri eini betri mynd av teimum samfelagsligu fyritreytunum fyri vinnulívsmenning, og hesa avbjóðingina viðgera vit í Sosialinum næsta leygardag.

Gestur Hovgaard
Ronnie Thomassen